# Merkingar av laksi norðanfyri



JAN ARGE JACOBSEN
FISKIFRØÐINGUR

Í 2003 var aftur ein roynd gjørd at merkja laks norðanfyri (Mynd 1), og hesu ferð var bert laksur, ið hevði mist minni enn umleið 10 % av roðslu (roknað sum areal av øllum fiskinum), merktur við DST merkjunum, ið máta bæði hita og dýpi. Royndir frá laksamerkingum í 2002 vístu, at mist roðsla var orsøkin til at ongin laksur varð fingin aftur. Um laksurin hevði mist meira enn 10 % av roðslu, vóru tey bíligaru *iButton* merkini sett á fiskin, ið bert máta hita. Tilsamans vóru 116 laksar merktir, 95 laksar við DST merkjum og 21 laksar við *iButton* merkjum. Longdin á laksunum sæst í Mynd 2. Tað vísti seg, at tal av laksi pr. troltíma var hægst í sjógvi á umleið 7 hitastigum, meðan lítið og einki var at fáa í heitari sjógvi.

Fyri at tryggja, at merkti laksurin verður tikin frá, um hann verður fiskaður aftur við t.d. tráðu, varð eitt vanligt "spaghetti" merki sett á fiskin undir ryggfjøðurini, umframt goymslumerkið í búkinum á laksinum. Hetta "spaghetti" merkið sæst beinan vegin, um laksurin verður havdur á hondum, og á merkinum stendur, at goymslumerki er inni í fiskinum. Fitifjøðurin var eisini klipt av laksinum fyri at gera vart við, at hann er havdur á hondum. Men hetta er ikki altíð nóg mikið til at fiskurin verður tikin frá, og tí vóru eyka merki sett uttan á laksin í 2003. Nú er bert at bíða og vóna at onkur av teimum merktu laksunum verður fingin aftur.

**Norðurlendsk verkætlan**
Laksakanningarnar eru liður í norðurlendsku verkætlanini "Distribusjon, miljørelasjoner og tilhørighet hos laks i Nordatlanten – havfangst, merking og utsetting av laks med minidataloggere".




***Mynd 1.*** *Kósir hjá Magnusi Heinasyni á laksamerkingunum norðanfyri (túrur 0384) 22-29/10 2003. Mest av laksi var at fáa á 64°20'N 8°00'V.*

**Mynd 2.** *Longdarbýti av 116 merktum laksum og av 62 laksum, ið ikki kundu merkjast vegna mista roðslu ella annan skaða.*




**Framtíðarætlan**
Á heysti 2004 verður laksur merktur aftur.

## Állur - *Anguilla anguilla*

Ein serliga stórur állur varð funnin á bønum við Nesá á Nesi í Eysturoy tann 8. november 2003. Hann lá á turrum, og er helst skolaður upp á bøin, tá áin floymdi yvir áarbakkan.

Tað var Jógvan Ingvard Olsen á Toftum, sum rakti við hann, og Jógvan tók tann livandi állin við sær til hús, har hann varð sleptur í eina balju til fólk frá Fiskirannsóknarstovuni kom eftir honum.

Állurin var 91,4 cm langur, 19,2 cm í ummál og vigaði 1.660 gramm rund vekt. Tað er sjálsamt at síggja so stóran áll í Føroyum, men ein varð tó veiddur í Hósvík í 1972, sum var 125 cm langur. Tað vanliga er, at kvennfiskar í Føroyum sjáldan verða longri enn 65 cm. Kallfiskarnir eru minni, upp til 51 cm.

Állur verður gýttur í Sargasso-havinum (eystan fyri Vestindisku oyggjarnar). Haðani rekur hann sum yngul norður til Europa, og eisini til Føroyar. Her fer hann upp í feskvatn sum glasállur, umleið 7 cm langur. Hann livir so í feskum vatni, áum, vøtnum og tjarnum, til hann sum vaksin fer aftur á sjógvin fyri at leita sær aftur til Sargasso-havið at gýta.

Jógvan Ingvard, sum fann hendan állin, heldur, at hesin er komin oman úr Starvatni, sum er oman fyri Nes.



*Állur*

**Rógvi Mouritsen**